# Breiðband



| | | | |
|---|---|---|---|
| **1. Bílegging fevnir um** | ☐ Stovning ______ <br> ☐ Umskifti | ☐ Flyting ______ <br> ☐ frá Uppsøgn | |
| **2. Kundaupplýsingar** | Slag av kunda ☐ Privatkundi <br> ☐ Vinnukundi ☐ Pf. ☐ Spf. ☐ Kf. ☐ Pr. ☐ Lf. Annað: | | |
| | Navn/fyritøka | Eftirnavn | |
| | Kundanummar | Føðingardagur/vinnutal | |
| | Bústaður | Postnummar | Bygd/býur |
| | Postrúm | Matrikkulnummar | Faks |
| | Kontaktnummar/fartelefon (skal útfyllast) | Teldupostadressa | |
| | Fyrrverandi bústaður (Bert útfyllast, tá talan er um flyting) | Annað hald, sum skal flytast við? | |
| **3. Brúkari** <br> íbindingarstað <br> (skal bert útfyllast, um brúkarin er annar enn kundin) | Navn/fyritøka | Eftirnavn | |
| | Bústaður | Postnummar | Bygd/býur |
| | Postrúm | Matrikkulnummar | Faks |
| | Kontaktnummar/fartelefon | Teldupostadressa | |
| **4. Tilknýti til aðrar tænastur** <br> sí vegleiðing | Eg standi fyri heimatelefon <br> ☐ Ja ☐ Nei | Telefonnummar: | |
| | Onnur nummur: | | |
| | *Hugsast skal um, hvat møguligt undirnummar/eykanummar verður nýtt til t.d faks | | |
| **5. Tænasta** <br> inn-/útgangandi linjuferð | ☐ 10/1 Mbit ☐ 20/2 Mbit ☐ 40/4 Mbit ☐ 50/5 Mbit ☐ 75/7 Mbit ☐ 100/10 Mbit | | |
| **6. Viðmerkingar** | ______ <br> ______ | | |
| **7. Váttan** | **Undirritaði váttar, at hesar upplýsingar eru rættar, at undirritaði er myndigur og gjørdur varugur við galdandi viðskiftatreytir, og undirritaði bindir seg til kostnaðin, ið stendst av haldinum. Somuleiðis váttar undirritaði, at eingin eftirstøða er til Føroya Tele.** | | |
| | Dagfesting | Navn | Undirskrift |
| **8. Føroya Tele fyllir út** <br> innanhýsisskráseting | Dagfesting | Sølufólk | |

Kundatænastan, Postsmoga 27, 110 Tórshavn • Tel 80 80 80 • Faks 32 10 91 kundi@ft.fo www.ft.fo•

# Vegleiðing til
# Breiðband privat



## Viðskiftatreytir

Hesin teigur greiðir frá viðskiftatreytum fyri Breiðband privat, galdandi frá 1. september 2005.

## Gildisøki

Hesar viðskiftatreytir eru galdandi fyri Breiðband privat.

Hesar viðskiftatreytir eru sertreytir í mun til almennu viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele. Er ósamsvar millum hesar viðskiftatreytir og almennu viðskiftatreytirnar, eru tað hesar, sum eru galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru almennu viðskiftatreytirnar galdandi.

## Breiðband privat

Við Breiðband privat fært tú eitt hald við fríari nýtslu upp til eitt ávíst loft.

## Treytir

Føroya Tele skilar sær rætt til at skerja linjukapasitet fyri einstakar ella fleiri kundar við hátyngd.

Føroya Tele skilar sær rætt til at raðfesta og seta filtur á ferðsluinnihald, sum kann verða avmarkaðandi fyri tænastuna.

Føroya Tele kann ikki tryggja, at áljóðandi linjukapasitetur til tín kann nýtast til fulnar á internetinum. Føroya Tele kann heldur ikki tryggja, at tú altíð hevur samband við hægst møguligari ferð.

Víðarisøla av øllum ella pørtum av haldinum er ikki loyvd. Rættindini til haldið falla aftur til Føroya Tele, tá haldið verður uppsagt, herímillum møgulig IP-adressa.

Føroya Tele hevur rætt til at broyta IP-adressur.

Føroya Tele hevur ikki ábyrgd av teimum upplýsingum, sum eru tøkar hjá tær í sambandi við atgongd til internetið, herímillum heimasíður, teldubrøv, tíðindabólkar og kjattbólkar.

Føroya Tele hevur ikki ábyrgd av tí dátamissi, sum internetið kann hava við sær, herímillum dátamissur í sambandi við virusfongdan tólbúnað og ritbúnað.

Um tú ikki hevur heimatelefon, skalt tú rinda linjugjald fyri nýtslu av breiðbandslinjuni.

Um brúkarin er annar enn tú, (sí teig 3 í oyðublaðnum), og brúkarin ikki hevur heimatelefon, verður brúkarin álagdur linjugjald.

Tað áliggur brúkaranum at upplýsa Føroya Tele um broytingar á hesum øki. Bæði um tú/brúkarin fær heimatelefon, ella um heimatelefonin verður uppsøgd ella niðurløgd á annan hátt.

## Feilmelding

MIðað verður ímóti, at feilrætting er byrjað innan 12 arbeiðstímar frá tí, at Føroya Tele hevur móttikið eina feilmelding frá kundanum. Arbeiðstíðin er frá 8.00 til 16.00 gerandisdagar.

## Broytingar

Broytingar, ið sum heild eru til fyrimuns fyri teg, kunnu setast í verk beinavegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar kunnu setast í verk við minst 1 mánaðar ávaring til eitt mánaðarskifti.

## Uppsøgn og mishald

Tú kanst broyta ella uppsiga haldið við 10 arbeiðsdaga ávaring til eitt mánaðarskifti. Føroya Tele kann uppsiga haldið við 1 mánaða ávaring. Verður haldið mishildið, kann tað verða uppsagt sambært almennu viðskiftatreytunum.

## Avmarkingar

Breiðband Privat kann bert veitast á støðum, har samskiftiskervið er útbygt við ADSL, og har linjulongd og góðska annars eru nøktandi til tænastuna. Sí **www.ft.fo.**

## Almenn viðurskifti

Hesin teigur vegleiðir teg um, hvussu tú fyllir út umsóknarskjalið til stovning av Breiðbandi privat frá Føroya Tele.

Viðvíkjandi prísum verður víst til www.ft.fo.

Er umsóknarskjalið ikki rætt útfylt, skilar Føroya Tele sær rætt til ikki at stovna haldið, fyrr enn neyðugu upplýsingarnar eru tøkar.

Stovningin er bindandi, tá ið umsóknarskjalið er undirskrivað ella 14 dagar eftir móttøku av ordraváttan.

## 1. Bíleggingin fevnir um

Set kross.Tá talan er um stovning útfyllir Føroya Tele dsl nr. teigarnar.

## 2. Kundaupplýsingar

Tú stendur fyri og hevur alla ábyrgdina av haldinum.

Fyll út teigarnar við fornavni, eftirnavni, føðingardegi, bústaði og matr.nr. Um tú longu ert viðskiftafólk hjá Føroya Tele, skal kundanummarið eisini skrivast (stendur í telefonrokningini).

## 3. Brúkari (íbindingarstað)

Skal fyllast út, um brúkarin er annar enn tú.

## 4. Tilknýti til aðrar tænastur

Tú skalt upplýsa, um tú stendur fyri eini heimatelefon. Er talan um, at brúkarin er ein annar enn tú, verður upplýst, um brúkarin stendur fyri heimatelefon. Um ikki, verður brúkarin álagdur eitt eykagjald fyri linjuna.

Um tú/brúkarin hevur heimatelefon, og hetta er ISDN, skal eisini upplýsast, um ynskt verður at skifta haldið um við vanligt telefonhald. Atlit skal takast til, um tú brúkar eykanummar ella undirnummar til neyðugar funktiónir, t.d. faks ella líknandi. Í ávísum førum kann talan verða um neyðugt umskifti, t.d. um linjumangul er.

Hevur tú/brúkarin eitt ADSL breiðbandssamband frammanundan, er megin reglan tann, at ikki ber til at bíleggja, fyrr enn sambandið er uppsagt.

## 5. Tænastan

Linjuferðin er upplýst sum inngangandi/útgangandi ferðsla.

Inngangandi ferðla er linjuferðin frá samskiftisnetinum hjá Føroya Tele til kundan. Útgangandi ferðslan er linjuferðin frá tínum til samskiftisnetið hjá Føroya Tele.

## 6. Viðmerkingar

Hevur tú viðmerkingar til Føroya Tele, skulu tær skrivast her. Søkir tú um flyting, skal gamli bústaðurin skrivast undir viðmerkingunum.

## 7. Váttan

Galdandi viðskiftatreytir eru at fáa í Telebúðunum kring landið, í telefonbókini og á **www.ft.fo.**

Set teg vinarliga í samband við Kundatænastuna, tel. 80 80 80, um tørvur er á hjálp til at fylla út umsóknarskjalið.